

Ævintýrarin Gunnhild Dahl Niclassen:

# EINASTI KVINNILIGI DEKKARIN UMBORÐ Á BRIMLI

**FAKTA**

**Navn:** Gunnhild Dahl Niclassen
**Aldur:** 22 ár
**Bústaður:** Klaksvík
**Starv:** Dekkari umborð á Brimli
**Frítíðarítriv:** At ferðast, ganga túrar í fjøllunum við pápanum, skótaleiðari

**SAMRØÐA**
**Lív Højsted Horsdal**
**horsdal@sosialurin.fo**
**Myndir: Jan Müller**

Saman við manningini umborð á Brimli siglir Gunnhild Dahl Niclasen kring Føroyar og í altjóða sjógvi. Og tá eitt óhapp er hent, er Brimil ofta fyrstur á staðnum:

– Eg vaski, máli og geri annað, sum har til hoyrir. Tá vit leggja at, skulu vit dekkarar binda skipið. Og onkuntíð skulu vit sleipa og hjálpa onkrum báti, sum er í neyð, sigur Gunnhild, sum somuleiðis hevur vakt á brúnni umleið átta tímar um dagin:

– Tá siti eg á brúnni saman við stýrimanninum ella skiparanum og hyggi eftir boyum og øðrum skipum og bátum. Onkuntíð vitja vit eisini ymiskar bátar og skip og kanna um alt er í lagi umborð. Og tað er so avgjørt ikki altíð so gott skil á, váttar Gunnhild.

**Javnrættur umborð**

Hóast Gunnhild er einasta kvinna umborð á Brimli, er eingin munur á hennara arbeiði og so á arbeiðinum, mannfólkini gera:

– Hóast eg ikki eri av sama kyni, sum restin av manningini, verði eg ikki viðfarin á annan hátt. Annars haldi eg, at mannfólk ofta hava hug til at gera alt fyri kvinnuna, men soleiðis er tað ikki umborð. Í roynd og veru geri eg alt tað sama sum teir.

– Onkuntíð eri eg tó ikki nóg sterk til at lyfta okkurt tungt, men tá er altíð onkur klárur við einari hjálpandi hond, so tað hevur ongantíð verið ein trupulleiki.

*Men hvat siga vinir og kenningar til, at tú í roynd og veru hevur valt tær eitt mannfólkaarbeiði?*

– Teir halda bara, at tað er stuttligt og øðrvísi, sigur Gunnhild og slær fast, at hon ikki hevur valt hetta arbeiðið fyri at gera uppreistur ella at